## Fritzl í rættin í mars

Dómsvaldið í Eysturríki hevur nú gjørt av, at rættarmálið ímóti Josef Fritzl byrjar tann 16. mars. Eysturríkska ákæruvaldið hevur ákært Josef Fritzl fyri morð, neyðtøku, burturflyting, blóðskemd, ágang og trælahald. Hann kann fáa lívlanga fongsulsrevsing. Tann 73 ára gamli Josef Fritzl hevur viðgingið, at hann misbrúkti dóttur sína Elisabeth, og at hann fekk sjey børn saman við henni. Hinvegin sigur hann seg ikki hava ábyrgdina av, at eitt av børnunum doyði sum nýføðingur. Roknað verður við, at rættarmálið fer at taka eina viku.



## Sct. Brigid Day verður 1. februar

Sct. Brigid er vælkent Írskt halgimenni, sum livdi frá ár: 453-523. Hon var kend fyri síni mongu undur, serliga at gera vatn til bjór. Føroya Bjór hevur í 2008 havt fýra ymsar Sct. Brigid Special Bjór. Hetta hevur verið í samband við 120 ára dagin hjá Føroya Bjór. Bjórinar hava verið væl móttiknar, serliga er tað Sct. Brigid Ale, ið er populer. Fleiri hava roynt Sct. Brigid Ale til matgerð og afturvið mati. Í samband við Sct. Brigid day, ið er 1. februar fæst í avmarkaðari nøgd: Sct. Brigid Ale, Sct. Brigid IPA og nakað av Sct. Brigid Blond. Frá Føroya Bjór verður sagt, at tey ikki heilt hava avgjørt um allar bjórinar koma aftur á føroyska marknaðin. Í løtuni framleiðir Føroya Bjór 20 sløg av øli og 15 av sodavatni. (www.bjor.fo)

# olitiskum dráli



*– Vit føla okkum gloymd. Mentamálaráðið hugsar opinbart ikki um at næmingar koma at sita í klemmu. Tey hugsa bara at nú skulu nakrar broytingar koma ígjøgnum, og so ikki longur, sigur Annika Due Petersen*

Vit hoyrdu seinni at talan var um størri broytingar, og tí vildu vit sleppa at síggja uppgávur av tí slagnum, vit kundu vænta at fáa, soleiðis at vit kundu fyrireika okkum, sigur Annika Due Petersen.

Næmingarnir fingu at vita, at uppgávur vóru á veg, og at tey sluppu at síggja tær skjótt. Síðan bleiv tað útsett til november, og ikki fyrr enn í desember komu tær ensku. Tá vóru næmingarnir farnir undir høvuðsuppgávuna, og tí var eingin tíð at fyrireika seg fyrr enn nú í januar.

– Harafturat fingu vit bara eitt uppgávusett, so vit hava als ikki havt møguleika at seta okkum inn í nýggju skipanina, greiður Marnar S. Kristiansen frá.

Í enskum hava tey sæð eitt uppgávusett, ið líkist tí, ið tey kunnu vænta at fáa, men í donskum er støðan ikki eingong so góð. Har skulu allir lærararnir í donskum á fund tann 31. januar, har teir verða kunnaðir um broytingarnar.

### Føla seg gloymd

Tað sum eftir ætlanini hjá næmingunum skuldi verða endaspurturin til at fáa teir góðu karakterirnar til endaligu royndirnar, verður nú ístaðin brúkt til at sita og bíða eftir at fáa boð um broytingarnar.

– Vit føla okkum gloymd. Mentamálaráðið hugsar opinbart ikki um at næmingar koma at sita í klemmu. Tey hugsa bara at nú skulu nakrar broytingar koma ígjøgnum, og so ikki longur, og tað er rættiliga irriterandi, tí hetta er okkara framtíð, sum tað rakar, vísir Annika Due Petersen á.

Bæði greiða tey eisini frá, at áðrenn føldu tey seg rættiliga sikkur uppundir royndirnar, og at tey, eftir at hava lært hesi tingini í hálvtriðja ár, nú høvdu lært tað, tey skulu duga. Men nú er fjáltur komin á næmingarnar, og tey føla seg ósikkur og strongd, tí tey nú brádliga skulu læra nakað heilt annað, og upp á lítið hálvt ár.

### Krevja broytingarnar afturtiknar

Loysnin á trupulleikunum hjá øllum teimum næmingunum, ið verða raktir av broytingunum, er at broytingin verður tikin aftur fyribils og ikki sett í verk mitt í einum ári.

– Broytingarnar tykjast góðar, men vit hava ongan møguleika at seta okkum inní nýggju broytingarnar, tá so stutt er eftir til endaligu próvtøkurnar. Tí vilja vit heita á Mentamálaráðið um at útseta broytingina, soleiðis at hon kemur í gildi við ársbyrjan næsta ár, sigur Marnar S. Kristiansen

Hvørt Mentamálaráðið so skal at seta broytingarnar í gildi til tey, sum byrja í 3.s og 2.hf næsta ár, ella um tey velja at seta broytingarnar í gildi fyri tey, ið byrja í studentaskúlanum og HF-skeiðunum komandi ár, kann so diskuterast.

– Vit høvdu nokk klárað at sett okkum inn í tað, høvdu vit fingið tað at vita við ársbyrjan og kunna loyst uppgávur síðan tá. Men hálvt ár, og serliga seinna hálvan av seinasta árinum er alt ov lítið, staðfestir Annika Due Petersen.

Mótmælisskrivið og tær yvir 300 undirskriftirnar verða handaðar Mentamálaráðnum í dag, og næmingarnir vóna at avgerðin verður tikin rættiliga skjótt.

– Tað er býtt at vit mugu ganga her og stressa um at tingini hanga meir ella minni í leysari luft, og tí vilja vit hava eina skjót avgerð, sigur Annika Due Petersen.



*Munandi minni er komið upp á land av botnfiski fyrstu 11 mánaðirnar í ár í mun til í fjør*

# Útfluttu minni av fiski

**Samlaði útflutningurin vaks, fiskavøruútflutningurin minkaði, skrivar Hagstovan á heimasíðu síni**

ÚTFLUTNINGUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Samlaði útflutningurin frá januar til novembur í fjør vaks í mun til 2007. Orsøkin er at fleiri skip eru farin av landinum í fjør. Um vit ikki rokna skip og flogfør við, útfluttu vit nakað minni enn árið fyri.

Útflutningurin hesar 11 mánaðarnar var 3,9 mia. móti 3,7 mia. árið fyri. Tað er 200 mió. meir, ella ein vøkstur uppá 5%.

Virðið av útflutta fiskinum var 3,2 mia. móti 3,5 mia. í 2007. Tað er ein minking uppá 9%.

Nøgdirnar av útfluttum fiski minkaðu enn meir. Úr 374 tús. tonsum í 2007 niður í 285 tús. tons í fjør. Ein minking uppá 24%. Høvuðsorsøkin til at nøgdirnar eru minkaðar meira enn virði, er at tað serliga er nøgdin av bíligum fiskasløgum, sum svartkjafti, makreli og lodnu, sum er minkað nógv, meðan tað varð útflutt meir av teimum dýraru fiskasløgunum sum laksi og síli.

**Útflutningur jan-nov skift á høvuðsbólkar í mió kr.**

| | 2007 | 2008 | munur | % munur |
|---|---|---|---|---|
| Botnfiskur | 1.548 | 1.379 | -169 | -11% |
| Flundrufiskur | 219 | 153 | -66 | -30% |
| Alifiskur | 528 | 880 | 352 | 67% |
| Uppisjóvarfiskur | 572 | 394 | -178 | -31% |
| Skeljafiskur | 111 | 112 | 1 | 1% |
| Annar fiskur og fiskaúrdráttur | 571 | 310 | -261 | -46% |
| Aðrar vørur | 125 | 144 | 19 | 15% |
| Skip | 74 | 572 | 499 | 676% |
| Útflutningur samantalt | 3.749 | 3.945 | 197 | 5% |
| Fiskavøruútflutningurin samantalt | 3.549 | 3.229 | -321 | -9% |

**Fiskavøruútflutningur jan-nov skift á høvuðsbólkar í tonsum**

| | 2007 | 2008 | munur | % munur |
|---|---|---|---|---|
| Botnfiskur | 62.808 | 55.566 | -7.242 | -12% |
| Flundrufiskur | 6.850 | 5.311 | -1.539 | -22% |
| Alifiskur | 18.561 | 33.559 | 14.998 | 81% |
| Uppisjóvarfiskur | 184.709 | 118.202 | -66.507 | -36% |
| Skeljafiskur | 9.339 | 9.406 | 68 | 1% |
| Annar fiskur og fiskaúrdráttir | 92.033 | 63.181 | -28.852 | -31% |
| Fiskavøruútflutningurin samantalt | 374.299 | 285.224 | -89.075 | -24% |